


*Politiið kannaði túnið uttan fyri Dómhúsið væl og virðiliga*
Mynd: Jens Kristian Vang

# Varafútin innlagdur í nakrar dagar

**ÁLOP** Finn Ougaard fekk ein stóran sur í vinstra lær, tá ið ein 40 ára gamal maður, stakk hann við knívi beint við dyrnar á Dómhúsinum týsdagin

Randi Jacobsen

Dyrnar á Dómhúsinum hava altið staðið opnar í dagtímunum. Ein og hvør hevur kunnað farið inn.

Men ivasamt er, at dyrnar í framtíðini fara at verða líka víðar.

Hetta er í hvussu er nakað, sum politiið og dómsvaldið tosa um eftir hendingina týsdagin, tá ið varafútin varð stungin við dálki, júst sum hann fór úr Dómhúsinum.

Við tað at Dómhúsið er undir umbygging, verða rættarfundirnir hildnir í øðrum hølum undir Glaðsheyggi.

Tað var tí ikki í sambandi við nakran rættarfund, at varafútin hevði verið í Dómhúsinum, og álopsmaðurin skuldi henda dagin ikki fyri rættin.

Hvat álopsmaðurin gjørdi við Dómhúsið, visti Jón Klein Olsen, varapolitikommisrur týsdagin ikki at siga.

Tá ið Finn Ougaard kom ut úr Dómhúsinum, stóð tann 40 ára gamli kenningurin uttan fyri, og áðrenn Finn Ougaard fekk vart seg, varð hann stungin við einum stórum dálki í lærið. Blaðið á knívinum var 20 cm langt. Áðrenn hann stakk, segði maðurin eitthvørt við varafútan.

Hvat hann segði, visti Jón Klein Olsen ikki týsdagin, tí Finn Ougaard var ikki avhoyrdur.

Finn Ougaard varð beinanvegin fluttur á Landssjúkrahúsið, og politistar í stórum tali komu á staðið at gera kanningar, bæði við hundum og tólum.

Eina evarska løtu eftir at politistarnir vóru farnir av politistøðini, fór ein annar maður inn á støina. Tað var tann 40 ára gamli maðurin, sum meldaði seg sjálvan fyri at hava framt illgerðina.

Knívin hevði hann lagt eftir seg uttan fyri Dómhúsið.

## Ókent motiv

Jón Klein Olsen hevi týsdagin onga hóming av, hvat motivið hjá tí 40 ára gamla manninum var fyri at stinga varafutan við knívi. Tað er tó greitt, at varafútin sum árkæri mangan í rættinum hevur sitið yvir fyri tí 40 ára gamla manninum, sum líka síðan hann var blaðungur hevur fingið mangan dómin.

Tað er ikki ókent, heldur ikki í Føroyum, at ákærar kenna seg hóttar av fólkum, teir hava kravt revsaðar. Einki fordømi er tó í Føryum um, at nakar vápnaður er lopin á nakran ákæra.




*Nakað eftir tilburðin greiddi Jón Klein Olsen, varapolitikommiserur frá, hvat hent var. Hetta er fyrsta hending av sínum slag í Føroyum*
Mynd: Jens Kristian Vang

Jón Klein Olsen visti týsdagin ikki, um tann 40 ára gamli maðurin var ávirkaður. Dýrandi fullur var hann í hvussu er ikki, segði hann.

At stinga við knívi er eitt álvarsligt mál, og at stinga ein embætismann er enn álvarsligari. Politiið leggur tí upp til, at maðurin verður skuldsettur fyri drápsroynd.

Beint eftir tilburðin týsdagin varð Dómhúsið stongt.

Í dag gekk lívið í Dómhúsinum aftur sína vanliga gongd.

randi@sosialurin.fo